# TILTØK

## FØÐINGAR

18. mai fingu Eileen Jacobsen og Mortan Berjastein, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

18. mai fingu Bjørg Svabo og Heri Ziska, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3200 gr.

18. mai fingu Dora og Esmar Mikkelsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4400 gr.

21. mai fingu Malan Eyðunsdóttir og Magnus Østner, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

22. mai fingu Judith Eysturtún Joensen og Jógvan Rubeksen, Tórshavn, eina dóttur. hon var 53 cm. long og vigaði 3675 gr.

## ANDLÁT

**9. mai**
Dania Lindberg,m ættað úr Fámjin, búsitandi í Keypmannahavn, 79 ár.
Anna Endersen, fødd Strøm, ættað úr Trongisvági, búsitandi í Søborg, 83 ár.

**12. mai**
Niels Holm Mortensen, Argir, 94 ár.
Manuel Hansen, av Nesi, búsitandi í Svendborg, 74 ár.

**13. mai**
Pól Hans Muller, Tórshavn, 48 ár.

**14. mai**
Hilda Ellingsgaard, ættað av Eiði, búsitandi í Klaksvík, 74 ár.
Frants á Argjum, búsitandi í Esbjerg, 63 ár.

**16. mai**
Tór Hendriksen, vanliga nevndur Doy, Sandur, 72 ár.
Bodil Tausen, Tórshavn, 72 ár.

**19. mai**
Jógvan Andrias Olsen, vanliga nevndur Jógvan hjá Aksel, Klaksvík, 80 ár.

**20. mai**
Marius Rubeksen í Tórshavn, Marius á Posthúsinum, 79 ár.

**21. mai**
Erning Magnussen á Tvøroyri, vanliga nevndur Erning hjá bókbindaranum, 75 ár.
Asbjørn Olsen, í Hvalvík, 85 ár.
Georg Hansen, ættaður úr Ánunum, 62 ár.

**22. mai**
Robert Brech á Tvøroyri, 89 ár.
Olaf Breiðaskarð, Fuglafjørður, 58 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygard. 26. mai: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnud. 27. mai: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

*Norðoygjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Gudstænastur

*6. sunnudag eftir páskir*
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Norðskála:* kl. 10.40, skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
*Hósvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Kollafjørður:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Húsar:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen, kórið Safir úr Bergen medvirkar
*Argir:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Hvítanes:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Søldarfjørður:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Gøta:* kl. 11, Kjartan Mørkøre
*Hov:* kl. 11, Erland Beder
*Porkeri:* kl. 12, altarg., Jens Førgaard
*Skálavík:* kl. 12, Høgni Poulsen
*Gásadalur:* kl. 11,
*Mykines:* kl. 18, David Johannesen
*Hvannasund:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Fuglafjørður:* kl. 11, Uni Næs
*Á Leiti:* kl. 12,
*Sandvík:* kl. 14, Ólavur Rasmussen
*Tvøroyri:* kl. 11, Petur M. Rasmussen

### Havnar kirkja

Matiné verður í Havnar kirkju leygardagin 26. mai kl. 11.30 við »Havnar Ungdómshornorkestri«. Leiðari: Kenneth Jones.

### Rhema, Tórshavn

Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Team frá Logos II luttaka. Øll eru vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma. Vit fara túr til Hoyvíksgarð.
Sunnudagin 24. juni kl. 14 gera KFUM og K útferð – um viðrar – við Norðlýsinum, vestur um Hestoynna. Sigið frá áðrenn 11. juni á tlf. 311928. Havið matpakka og okkurt drekkandi við. Ferðin varar 5 t. Luttøkugjald 200 kr.

### Ebenezer

Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti við luttøku av manningini frá Logos II, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Frelsunarherurin, Tórshavn

Kvinnustevna 2001 frá 25.-27. mai »Gud skapti«. Kommandør Berit Ødegaard og major Turid Gamst. Fríggjadagin kl. 20 Stevnan verður sett, allar kvinnur eru vælkomnar.
Leygardagin kl. 10 útferð.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, kl. 13.30 sunnudagsskúli ella útferð, kl. 15.30 kvinnumøti, kl. 18 alment møti.
Mánadagin kl. 17 skótar.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti, fólk av »Logos II« luttaka við talu og sangi, kl. 22 útimøti v/Meinigheitini í Hoyvík.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Meinigheitshúsið

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jógvan Petersen, Manskórið og kvinnutrio syngur.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### Katólska kirkjan

Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 giftast í Mariukirkjuni Lucita Banzon, Kollafjørður og Sámal Jákup Sakarisson, Hattarvík.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Anders Baadsgaard Jensen í Mariukirkjuni.
Eingin sunnudagsskúli verður.
Mánakvøldið kl. 19.30 heldur Anders Baadsgaard Jensen prestur, fyrilestur í Mariukirkjuni um Frans av Assisi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin er eingin sunnudagsskúli og einki møti. Kl. 22 útimøti á Vaglinum.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior, kl. 17.30 bønarløta, kl. 18 møti við Rúna Mortensen og Júttu Reynslág, Chorus syngur – innsavnað verður til missiónsarbeiðið.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við nevndini.
Mikumorgun kl. 07 bønarløta.
Hóskvøldið kl. 20 bíbliutími við Gunnar Reynslág. Evni: Bøn – Jesus: Matt. 26, 36-46, 27, 45-46, Luk. 23, 34-46. Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Hebron, Argir

Sunnudagin kl. 10.30 morgunmøti, kl. 12 sunnudagsskúli og kl. 18 missiónsmøti, har Símin og Ása Ósá greiða frá.

### Saron, Vestmanna

Sunnudagin møti kl. 18.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

### Nesvík

Felagsmissiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 18.30 bønarhald, kl. 19.30 møti við Magna, Niels Juul, Gulaki o.ø., Kirkjukórið í Vestmanna syngur, innsavnan. Kl. 22.30 gospelkonsert við ymiskum ungdómsbólkum, dramaframførsla, drekkamunnur aftaná. Sunnudagin kl. 15 felagssunnudagsskúli/familjumøti, kl. 17 bønarhald, kl. 18 møti við Regin Høgnesen, trúboðara, Meinigheitskórið syngur, innsavnan.

### Filadelfia, Sundalagið

Í annaðkvøld kl. 18 kvøldmøti við Ásu Poulsen.
Mikudagin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin – títt kvøld – tónleikur, spøl, ítriv og matgerð.

### Keldan, Skálafirði

Kristi Himmalsferðardag kl. 11 morgunmøti við Jastrid og Paula Høj. Vón fyri framman, sum skuldi vera fríggjadagin er útsett, nærri verður lýst aftur í bløðunum. Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Jan Jacobsen. Sunnudagin kl. 17 møti við Eyðun Jacobsen, kl. 17 barnamøti.
www.keldan.fo

### Soli Deo Gloria

Mikumorgunin kl. 06 bøn. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti. Fólk frá Logos II luttaka.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

**Úr morgunlestrunum hjá Torgarð presti.**

*Men hetta er hitt æviga lívið, at teir kenna teg, hin eina sanna Gud, og tann, sum t´ú sendi, Jesus Krist.*

*Jóhs. 17,3*

Tað verður sagt frá, at tann tiltikni sjófararin, munkurin Sankta Brandan, á ferðum sínum eisini kom til Føroya. Hann og felagar hansara komu á land í Kirkjubø, har Brandansvík enn ber navn hansara og eftir øðrum staðarnøvnum eftir søgnum at døma hava teir verið nógva aðrastaðni í Føroyum.

Teir vóru farnir av stað at leita eftir tí fyrijáttaða landinum, Paradisoyggjunum, sum lógu onkustaðni vesturi í havinum teir komu víða um. Sum frásagt eisini til Føroya. Hvør veit? – kanska vóru tað nakrir av feløgunum hjá Sankta Brandan, sum fyrstir settu búgv her. Í hvussu so er vita vit, at tá ið teir norðurlendsku landnámsmenninir komu higar, máttu munkarnir taka til rýmingar.

Norðbúgvarnir gjørdust Føroyingar, og skj´tot gjørdust teir eisini kristnir sum teir, ið undan teimum her høvdu búð.

Føroyar vóru ikki Paradisoyggjarnar og eru tað heldur iki í dag. Menm boðskapurin um paradísið, hitt fyrijáttaða landið, verður enn borin okkum. Í orðunum hjá Jesusi um hitt æviga lívið liggur ikki bara tað, sum vit vanliga munnu hugsa, at tað er bara nakað, sum liggur hinumegin hesa tilveru á foldum. Men hitt æviga lívið er her hjá okkum, í jarðisk alívi okkara. Og tað er okkar aogn, tá ið vit kenna Gud og Jesus Krist. Boðskapurin hevur verið borin á ymiskan hátt í øldunum, sum farnar eru, og menniskjuni hava verið ymisk til. Men fyri Gudi er menniskjan tann sama. Hon er tað, hon er í Guds eygum; hvørki meira ella minni.

Men tað, sum betri er og meira er at leggja dent á, er at boðskapurin er tann sami. Og hann ber eisini í sær vónina um hitt fyrijáttaða landið, sum Sankta Brandan leitaði eftir, og sum øll mannaættin tráar eftir at finna.

Tað er tað, sum Hans Andrias Djurhuus sigur í eini yrking um Sankta Brandan:

Løn tú fært fyri trúskap tín
– drívur døgg, fellur salta rín
um stevnið og hvílandi árar.
Nú rekur bátur tín oyggjunum nær
– líðandi aldan bárar.
Paradísoyggjarnar eru har,
ið tað aldri vetrar og várar.



# TILTØK

### Ørkin, Saltangará

Evangeliskt møti verður í Arbeiðarafelagshúsinum »Hæddin« í Saltangará sunnudagin kl. 17 við Theodor (Teddy) Petersen, sum talar og syngur. Møguleiki er at fáa forbøn.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19 í Syðrugøtu hjá Mikkulinu Magnussen.

### Aglow, Klaksvík

Møti verður í Bøgøtu 3, 25. mai kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti. Innsavnan verður.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Vikuskiftismøti verða leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við luttøku úr Hoyvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Tvøroyri

Møtirøð fyri øll í Trongisvágsskúla 26.-27. mai. Evni hesar dagarnar: Frælsi frá ótta. Leygardagin kl. 15, leygarkvøldið kl. 20 (ungdómur). Sunnudagin kl. 15, sunnukvøldið kl. 20. Talari: Ólavur Jacobsen.

### Missiónshúsið í Vági

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Árna og Ásbjørg Kjærbæk, øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur

Leygarkvøldið kl. 20 útimøti í Vági um viðrar.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Magnus Jensen.

### Reyði Krossur Føroya

Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

### Føroyskt møti

Sunnudagin 27. mai kl. 15 verður føroyskt møti í Zionskirkens sognhus, Nygaardsvej 103, Hildibjartur Højgaard talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Tilhaldið í Tórsgøtu 21

Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 28. mai:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18. Seyma føroyskar fýrkantar saman til teppir. Á fyrstu hædd.
kl. 15-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin og túrin umborð á Logos hósdagin kl. 16 á tlf. 316491.
Túrur til Runavíkar fyri pensjónistar og fyrrverandi sjómenn umborð á Logos II hósdagin kl. 16.
Bókasøla í kjallaranum alla vikuna.
*Týsdagin 29. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hugleiðingar um Havnina í 1920'unum, síðsti partur. Hjørdis Háberg, Marjun Nielsen lesur.
*Mikudagin 30. mai:*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 31. mai:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
**Túrur umborð á Logos II, úr Havn kl. 15.00.**
*Fríggjadagin 1. juni:*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð en krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### Felagið Tórshavn – gonguturur

Sunnudagin 27. mai verður gongutúrur: Gøta-Leirvík. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og ein matpakka við. Tilmelding.

### AA-fundir í Havn

Reinsaríið, Tórsgøta 5: Leygarmorgunin kl. 9-10 roykfríur fundur.
Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

### AA-fundur í Eysturoy

Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### Javni N. Finsensgøta 32

Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

### Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn

er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

### LFÚ-skrivstovan

hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA

skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

### Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið

á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.



## BRÚDLEYP

Í dag, 26. mai kl. 13.00 verða Jacqueline Benzon og Róin Clementsen, Sangur, vígd í Samuelskirkjuni, Keypmannahavn. Br. adr.: Matthæusgade 50, 4. sal, lejlighed 42, 1660 København V.

Leygardagin 16. juni kl. 14 giftast í Kelduni í Skálabotni Olivia H. Joensen, Skálabotn og Jákup Súni Berg, Tórshavn. Veitslan verður í Leguhúsinum í Nesvík kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 1. juni á tlf. 441596, 315003 ella 254404.

Leygardagin 16. juni kl. 16.00 giftast í prestagarðinum í Vági Gunnbjørg Magnussen, Vágur og Torri Thomsen, Sumba. Brúðarveitslan verður í samkomuhúsinum í Sumba kl. 19.00 fyri innbodnum gestum.

Leygardagin 23. juni kl. 15 giftast í Christianskirkjuni, Oddbjørg Askham, Hvannasund og Rúni Sigurðsson, Klaksvík. Vælkomst verður á Hotel Norð kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 1. juni á tlf. 457514, 452002 ella 457535.

Leygardagin 23. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Lómstein, Tórshavn og Karstin Zachariasen, Hestur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.30. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 2. juni á tlf. 314952, 310692 ella 328023.